# Broyttar busstíðir í Havn

**Buss- og skúlaleiðin í Havn hevur nú fingið nýggja ferðaætlan, sum í hesum døgum verður borin í øll húsarhald í kommununi**




*Í síðsta mánaði hækkaði talið hjá bussleiðini í Havn í høvuðsheitum úr tveimum upp í tríggjar túrar um tíman. Nú eru nakrar smærri broytingar gjørdar afturat, og nýggja ferðaætlanin verður borin í hvørt hús í kommununi*

*Savnsmynd*

TÆNASTA
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Í februar í ár varð skipanin við ókeypis busskoyring víðkað við einum triðja túri um tíman. Broytingin bar sostatt í sær, at bíðitíðin minkaði munandi.

Nú eru nakrar smærri broytingar gjørdar afturat, sum ganga ynskjunum hjá einum breiðum brúkaraskara á møti, skrivar Tórshavnar kommuna í tíðindaskrivi.

Broytingarnar snúgva seg um fyrstu fráferðina á morgni úr Norðasta Horni og fráferðina hjá Skúlaleiðini av Farstøðini.

Nú nýggja ferðaætlanin er komin í gildi, vónar kommunan, at undirtøkan verður eins góð, og hon hevur verið, síðani ókeypis busskoyringin í Havn byrjaði 1. januar 2007.

Ferðaætlanin og nærri upplýsingar um Buss- og Skúlaleiðina síggjast á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu, www.torshavn.fo. Eisini verður ferðaætlanin borin í øll húsahald í kommununi.

Harumframt verða minni útgávur av ferðaætlanini hjá hvørjari bussleið sær at fáa í bussunum í næstum. Hesar kunnu eisini takast niður av heimasíðuni hjá kommununi, skrivar kommunan í tíðindaskrivi.




